

*Ein beiggi Hans Petur var kendi politikkarin Jákup Frederik Øregaard, sum var giftur við Helgu, sum var lærarinna í Gøtu*

## Anarki eftir kríggið

Eftir kríggið hevði Hans Petur sokallaða siviltænastu. Tað var tó ikki so lætt hjá dønum at fáa eitt skipað samfelag aftur. Hetta vísti seg eisini innan politiið. Serliga kend er tann sokallaða Eiturkoppagølan, har eitt lið av brotsmonnum hevði rottað seg saman við nøkur løgreglufólk, og her var talan um mutur av eini aðrari verð.

Ein gøta, sum minnir um hesa tíð, er júst gøtan, har Nomi og Hans Petur búgva, og tað er Peter Bangsvej á Frederiksberg. Júst í hesi gøtu hendi 19. februar1948 eitt dupultmorð, har hjúnini Inger og Vilhelm Jacobsen vórðu myrd. Hetta morð varð ongantíð alment uppklárað. Tað er vanliga fatanin, at tað vóru sterkar kreftir, sum ikki vildu hava morðið uppklárað, tí tað hevði samband við umrøddu viðurskifti.

Hans Scherfig skrivaði eina stuttliga skaldsøgu um hesa tíðina, og kallaðist hon Skorpionen.

Hans Petur og Nomi minnast væl hesa sakina. Hans Petur sigur, at har pengar eru, er altíð korruptión, og tað var eisini tað, sum var galdandi her. Eftir eina uppruddíng hjá politinum kom tó skil á aftur.




*Hans Petur var ein av teimum úr danska poltinum, sum kom til Klaksvíkar aftaná læknastríðið at tryggja lóg og landaskil. Hesin kransur við mynd er á Politihistorisk Museum sum eitt minni um hesa hending*

## Arbeiðið aftaná kríggið

Sum frá leið gjørdust viðurskiftinum aftur meira normal. Eitt tíðarskeið hevði Hans Petur vakt á Høvuðsjarnbreytastøðini.

Eftir eina tíð søkti Hans Petur starv sum politiassistentur á Amagar, og hann fekk tað. Her var uppgávan at sita á vakt og geva boð til hendan og handan, eisini til slíkar, sum fyrr høvdu verið yvir honum. Hans Petur legði frá sær sum politistur í 1980 eftir 40 ár í tænastu.

## Bjargaði ótilvitað landsmanni undan parkeringsbót

*Johan Restorff á Hafnia greiðir frá hesi stuttligu hending:*

Hann og pápi hansara Christian Dahl Restorff vóru á handilsferð í København í 1967 og høvdu teirra Volvo vøruvogn við.

Um middagsleitið parkeraðu teir á høgru síðu á Nørrebrogade, har mangir aðrir bilar stóðu parkeraðir.

Teir vistu ikki av, at aftaná kl.15.30 varð parkeringsforboð á vegastrekkinum.

Teir komu aftur til bilin kl. 16, og á rútinum framman lá ein parkeringsbót.

Teir skuldu heim við Tjaldrinum dagin eftir, so teir fóru beinanvegin at leita eftir næstu politistøð, og hon lá á Vesterbro Torv.

Teir komu inn í móttøkuna, og søgdu frá, at teir vóru føroyingar og av somu grund ikki so væl kunnaðir um parkeringsviðurskifti í København. Teir høvdu tískil fingið bót fyri óregluliga parkering.

Vagthavandi politistur tók orðið: "Er De fra Færøerne? Vi har en kollega ved navn Øregaard fra Færøerne ansat her. Han ville blive meget ulykkelig, hvis en af hans landsmænd under et besøg i København blev "premieret" med en parkeringsafgift. Lad mig lige se anmeldelsen."

Hann tók hesa í hondina, og skræddi hana í pettir, koyrdi hana í pappírskurvina, og segði brosandi: "God hjemrejse i morgen".

Hetta komu feðgarnir ikki at gloyma Hans Petur! Hann sigur sjálvur, at hóast tað er ein grundregla, at øll skulu viðgerðast líka, so er kortini pláss fyri at taka slík fyrilit.

## Aftur í Føroyum

Hans Peturi hevur altíð dámað væl í Føroyum, og hann hevur nýtt tey høvi, hann hevur havt, at koma aftur higar.

Beint eftir kríggið var hann eitt ár i Havn. Tað vóru føroyskir politistar, ein teirra var Henry Djurhuus, sum skuldu fara til Danmarkar á skúla í eitt ár, og Hans Petur fekk í boði at fara upp at loysa av. Hetta dámdi teimum sera væl.

Serliga minnist hann sýslumannin Gunnar Dahl Olsen. Hann kundi greiða nærum allar fløkjur við at tosa viðkomandi til rættis. Hann gjørdist eisini seinni semingsmaður á arbeiðsmarknaðinum.

Hans Petur var eisini í Føroyum sum eina avleiðing av læknastríðnum í Klaksvík. Hetta stríð kom í hæddina í 1955, tá ið danska stjórnin tvær ferðir sendi skip við politistum til Føroya. Tað fyrra, Parkeston, kom ikki á Klaksvík, men tað gjørdi tað seinna, Rolf Krake, sum eisini bardi ófriðin niður við harðari hond.

Danir vildu tryggja seg ímóti endurtøkum, so teir høvdu støðugt politistalið í Klaksvík árini aftaná. Teir vildu helst hava, at í minsta lagi onkur føroyingur var við í hesum liðinum, og tískil varð Hans Petur fleiri ferðir í Klaksvík árini aftaná. Men tað spældi alt friðarlaga av.

Ein uppgáva var at fáa dansin steðgaðan leygarkvøld á midnátt, so ikki varð dansað inn í sunnudagin. Hetta var ikki altíð so væl dámt, men tað gekk eisini við lagaligheit, hóast klokkan kundi blíva hálvgum eitt.

Hesa tíðina lá eisini væl fyri at fara á flot, eisini saman við beiggjanum Jákup Frederik.

## Familjan

Tá ið Hans Petur kom til Danmarkar búði hann hjá Poulinu Hansen, sum var ættað úr Kvívík. Hon fekk hann at fara á samkomu hjá KFUM í Valdemarsgade.

Her hitti hann Nomi, og tey blivu trúlovað. Tey blivu so gift í Mattheuskirkjuni í 1941, og her eru børnini eisini doypt.

Nomi arbeiddi tá á Magasin du Nord. Seinni kom hon at arbeiða sum laborantur við Statens Frøkontrol í 30 ár.

Nomi og Hans Petur eiga tvær døtur. Tann eldra Thurid er 65 ára gomul, og tann yngra Kirsten er 60 ár.

Kirsten er lærari, hon eigur trý børn. Elsti sonur hennara Jacob Bloch Jespersen, uppkallaður eftir langabbanum í Lorvík, er viðurkendur operasangari. Hann hevur sungið í nógvum londum. Síðan kemur Rasmus, sum er grannskoðari. Yngst er Marie, sum verður liðug sum lærari í summar.

Thurid eigur eina dóttir Malena, uppkallað eftir langommuni í Føroyum Maluni. Hon er fyrsta barnabarn hjá teimum báðum. Malena hevur lisið sjónleikaravísindi.



*Døturnar hjá Hans Petur og Nomi, Thurid og Kirstin, á vitjan í Leirvík*

## Beiggin Jákup Frederik

Ein beiggi Hans Petur var sum sagt Jákup Frederik Øregaard, sum gjørdist ein av okkara týdningarmestu politikkarum sum løgtingsmaður frá 1940 til 1978.

Hans Petur greiðir eisini frá um beiggja sín.

Jákup Frederik var føddur í 1906. Sum aðrir dreingir fór hann eisini at sigla sum ungur. Jákup Frederik var við Prinsessu Mariu og við Verdandi, har Elias Sofus í Køkinum í Norðragøtu var skipari.

Hann giftist við Helgu, sum var ættað úr Kvívík, og sum kom til Gøtu at vera lærarinna.

Tey bygdu í fyrsta umfari hús ovast uppi í Gøtudali, og var hetta nærum í oyðimørk tá. Ætlanin var, at konan skuldi arbeiða i Gøtu, og sjálvur skuldi hann rógva út í Lorvík. Til flutningin fingu tey sær